



*En vøllur verður til; Nýggi fótbóltvøllurin á Eiðinum í Vági er liðugur og eru umstøðurnar nú fyrstafloks. Fyrst gamli vøllurin, arbeitt verður við at gera nýggjan vøll og nýggji og stásiligi vøllurin*

*Myndir: D.Olsen*

# Hjartaliga vælkomin á jóansøku øll somul

Vágs Bóltfelag vil við hesi heilsan bjóða øllum vælkomnum á jóansøku. Okur bjóða aftur í ár eina fjølbroytta skrá, ið er komin til høldar í einum sera góðum samstarvi millum Vágs Bóltfelag, Vágs Svimjifelag, Vágs Kappróðrarfelag, Skótarnar í Vági og dansifelagið Jómsvíkingar.

Okkara greiða mál er at leggja alla orku í at skipa so væl fyri, at stevnugestir og bygdarfólkið kennir seg væl. Okur gleða okkum at taka ímóti tykkum, okkara gestum úr bygd og bý, og vera saman við tykkum og njóta vikuskiftið - vónandi í røttum jóansøkuveðri.

Fótbóltur, kappróður, tivoli, dansur, listaframsýningar, konsertir, skrúðgonga, midnáttarsangur og mangt annað er partur av forvitnisligu tiltøkunum á jóansøku hesaferð.

Hjá VB er stóra hæddarpunktið á jóansøkuni dysturin í 1. deild ímóti GÍ. Okur fara sjálvandi at spenna okkum út, fyri at geva okkara áskoðarum, og øllum jóansøkugestum annars, ein góðan dyst og leggja sjálvsagt doyin á at vinna, nú niðurteljingin til 100 ára dagin tann 5. juni 2005 er byrjað.

Góða jóansøku

**Vágs Bóltfelag**

# Heilsan frá Vágs Svimjifelag

Tvey tey síðstu árini, síðani jóansøku í Vági seinast, hevur VS fingið góð úrslit og serliga hjá góðu ungu svimjarunum. Vit hava havt svimjarar til Orknoyggjar, Shetland, Føroyar kapping í Hetlandi. Vit hava havt 3 dugnaligar og evnaríkar svimjarar í Køge Open kapping í Danmark, har svimjarar høvdu góðar tíðir og fingu heiðursmerkir.

Vágs Svimjifelag verður 25 ár komandi ár og er møguliga eitt ungt felag í svimjihøpi, men vit royna, hóast vantandi venjarar, at halda stand og eggja svimjarum at halda áfram. Men nú er endiliga ein glotti fyri framman, tí í summar hevur Vágs Svimjifelag fingið sáttmála við núverandi venjaran hjá Fuglafjarðar Svimjifelag, so nú røkist fyri, at nøsin kann setast upp móti gullmerkjum og betri tíðum hjá svimjarunum.

Vágs Svimjifelag vil við hesi heilsu takka øllum stuðlum fyri dyggan stuðul, handlar og fyritøkur í Vági og aðrastaðni, men serliga ein tøkk til Vágs Kommunu. Uttan tykkara stuðul hevði ikki verið møguligt at havt eitt svimjifelag í bygdini. Og ein serlig tøkk til Vágs Skúla fyri lán av hølum og amboðum. Hóast ringar tíðir vóna vit, at handilslívið í bygdini vil stuðla framvegis.

Vágs Svimjifelag ynskir øllum jóansøkugestum eina góða jóansøku og svimjarum og foreldrum eitt gott komandi svimjiár.

Við ítróttarkvøðu

**Vágs Svimjifelag**










